ikki bara at hyggja aftureftir, men eisini frameftir. Tí er upplagt at gera status og spyrja: hvar eru vit nú? Hvat hava vit við okkum frá teimum, ið ikki eru meir? (So vit eisini kunnu svara spurninginum) Hvar vilja vit fara?

Talurnar hjá Wayne peikaðu á, at vit standa frammanfyri broytingartíðum og tí gerast slíkir spurningar uppaftur meira viðkomandi; um vit ynskja at fyrireika okkum uppá tað, ið koma skal, mugu vit hava eitt trygt og sterkt grundarlag at standa á og at byggja á. Tá er umráðandi at hyggja eftir og reinsa tann ríka arvin, ið vit hava fingið frá øllum teimum, hvørs herar vit standa á, so at vit bara taka ‘gullið’ við okkum, men eisini tryggja, at vit taka alt gullið við. T.v.s. vit mugu hyggja eftir hvat vit hava, fyri síðani at kunna meta um hvat vit skulu taka við okkum og hvat vit skulu sleppa.

Tilvitanin, um hvørji vit eru og hvar arvurin kemur frá, er týdningarmikil fyri at skilja hvørji vit eru og hví vit eru har, sum vit eru í dag. Haðandi frá bera vit arvin (gullið) víðari, „pussa gullið“, byggja víðari, so vit áhaldandi vaksa í dirvi og trúgv og mennast í tí sannroynd, at Himmalin er nær millum okkum og at Himmalin er opinberur við frælsi, grøðing og styrki til hvønn einstakan. Á henda hátt kann vitnisburðurin verða breiddur víða um, at her er ein samkoma, har Guds nærvera trívist og menniskju møta Gudi til anda, sál og likam.

Sum dømi um nakað, ið vit m.a. hava arvað kann nevnast, trúfesti yvirfyri Gudi og ein rein og innilig trúgv (sami arvur sum Paulus metir, at Timoteus hevur og sum hann eisini nevnir í 2. Tim. 1:5). Umráðandi er at halda fast í tí góða og virða arvin frá forfedrunum, og omanfyri nevndi arvur er gull, ið er gott grundarlag ar byggja víðari á, men vit mugu eisini kanna eftir um nakað støv ella skittur hevur sett seg á gullið, og um so er mugu vit reinsa tað.

Paulus skrivar í 1. Kor. 15:58: „Verið tí fastir, elskaðu brøður mínir, óvikiligir, altíð ríkir í verki Harrans! Tit vita jú, at arbeiði tykkara er ikki til einkis í Harranum!“

Hetta var galdandi fyri tey, ið undan okkum eru farin, men er eisini galdandi fyri okkum. Tí kunnu vit heldur ikki bara ‘hvíla’ á tí arvi vit hava, men vit mugu áhaldandi arbeiða víðari; reinsa hann og bera hann víðari.

Tíðin er tí komin til, at vit sum samkoma fara at arbeiða meira miðvíst við hesum. T.s.v. at vit mugu gera upp við hvat er tann góði arvurin og hvat skal soldast frá. Ynski er, at vit kunnu vera erlig og tora at hyggja inneftir og spyrja okkum sjálvi hví vit gera so, sum vit gera og hugsa so, sum vit hugsa.

So vit saman kunnu „leggja av okkum alt tað, ið tyngir, og syndina, sum hongur so føst uppi í okkum, og við toli renna skeiðið, ið okkum er fyrisett, havandi eyguni vend á Jesus, upphavsmann og fullkomara trúarinnar.“

*A-M*



Filadelfia
*„Himmal á jørð“*




Síðani vit sum samkoma høvdu 50 ára føðingardag í september hevur vælkenda skriftstaðið í Heb. 12:1-2 ofta verið í mínum tonkum:

*Latið tí eisini okkum, táið vit hava so stórt skýggj av vitnum rundan um okkum, leggja av okkum alt tað, ið tyngir, og syndina, sum hongur so føst uppi í okkum, og við toli renna skeiðið, ið okkum er fyrisett, havandi eyguni vend á Jesus, upphavsmann og fullkomara trúarinnar, sum fyri gleðina, ið fyri Honum lá, tolin leið á krossi og legði einki í vanæruna – og situr nú við høgru síðu hásætis Guds!*

Vit eiga eftirhondini nógv, ið nú eru vorðin partur at hesum stóra skara av vitnum. Flestu undangongufólkini, til at stovna okkara samkomu, eru teirra millum nú, eisini eru nógv onnur farin frá okkum – alt ov tíðliga eftir okkara meting – og eru nú eisini í hesum stóra skýggi av vitnum.

Í samband við merkisdagar er upplagt

# NOVEMBER 2023

Leygardagur 4. **Reingerð:** Áshild og co.

Sunnudagur 5. Kl. 11.00 **Morgunmøti**
Kl. 11.45 **Barnamøti**
Møtivertar: Anton Petur, Fríðbjørn og Linda
Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.
Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur ØLL
Uppvørpa: Ragnar
Ljóðbland: Tummas D.
Tulkur: Ragnar
Talari:
Kaffivertar: Anton Petur, Fríðbjørn og Linda

Mánadagur 6. Kl. 20.00 **Bønarskúlin**
Ábyrgd/leiðari: Regin
Lovsongsleiðari:

Leygardagur 11. **Reingerð:** Mariann og co.

Sunnudagur 12. Kl. 11.00 **Morgunmøti við breyðbróting**
Kl. 11.45 **Barnamøti**
Møtivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður
Ábyrgd/Leiðari: Anna-May
Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur III
Uppvørpa: Ása Elisabeth
Ljóðbland: Sjúrður
Tulkur: Høgni
Talari: Alex
Kaffivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður

Mánadagur 13. Kl. 19.00 **Felagsbønarmøti í City Church**
Ábyrgd/leiðari:
Lovsongsleiðari:

Leygardagur 18. **Reingerð:** Margreth og co.

Sunnudagur 19. Kl. 11.00 **Morgunmøti og innsavnan til húsið**
Kl. 11.45 **Barnamøti**
Møtivertar: Nora, David og Kári
Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.
Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur I
Uppvørpa: Ragnar
Ljóðbland: Tummas D.
Tulkur: Ragnar
Talari: Mariann
Kaffivertar: Nora, David og Kári

Mánadagur 20. Kl. 20.00 **Bønarskúlin**
Ábyrgd/leiðari:
Lovsongsleiðari:

Leygardagur 25. **Reingerð:** No-omi og co.

Sunnudagur 26. Kl. 11.00 **Morgunmøti við breyðbróting**
Kl. 11.45 **Barnamøti**
Møtivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg
Ábyrgd/Leiðari: Mariann
Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II
Uppvørpa: Ása Elisabeth
Ljóðbland: Sjúrður
Tulkur: Høgni
Talari: Anna-May
Kaffivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg

Mánadagur 27. Kl. 20.00 **Lovprísan og forbøn**
Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur
Lovsongsleiðari:

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

# Heyststevna í Keflavík!



Í døgunum 20.-22. okt. var heyststevna í Hvítusunnukirkjuni í Keflavík, har Disa og Kiddi eru samkomuleiðarar. Eg havi vitjað har mong ár og onkuntíð hava vit verið fleiri, og í ár vóru vit ikki minni enn 14 fólk úr Filadelfia, sum vitjaðu.

Tað var eitt fantastiskt vikuskifti upp á fleiri mátar. Fyrst og fremst má nevnast, at ein slíkur túrur er mega stimbrandi fyri felagsskapin. Umframt møtir og shopping, so var tað fantastiskt bara at vera saman. Undirritaði leiddi lovsang á møtunum, og Hallur, Regin og Anfinn spældu við, so vit vóru fult orkestur. Alan Taylor var gestarøðari, men leygarkvøldið undirvísti Regin, og tað má sigast, at hansara undirvísing bergtók alla samkomuna bæði íslendarar, amerikanarar og føroyingar.

Tað er við takksemi, at vit nú kunnu hyggja aftur á eitt sera gevandi vikuskifti, og okkara samstarv og felagsskapur við Hvítusunnusamkomuna í Keflavík gerst bara sterkari og sterkari.

Heyststevnan hjá teimum er hvørt ár í oktober mánaða, og kanska vit fara enn fleiri í 2024. *tj*

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri! *Samkomuleiðslubólkurin*